# Stór svimjikapping

**Fuglafjarðar Svimjifelag hevur komandi vikuskiftið stóra svimjikapping**

SVIMJING
*Jákup Mørk*

Árliga svimjikappingin, FS-stevnan 2001, verður í Fuglafirði komandi vikuskiftið.

Í tíðindaskrivi sigur Fuglafjarðar Svimjifelag, at talan væntandi verður um einar 170 svimjarar, sum fara at kappast.

Talan er um yngru svimjararnar – 6 til 13 ár – hjá Tvøroyrar Svimjifelag, Vágs Svimjifelag, Havnar Svimjifelag, Flot av Toftum, Skeggjar úr Gøtu, og Fuglafjarðar Svimjifelag.

Kappingin byrjar leygarmorgunin kl. 10.00, og verður síðani hildið á allan leygardagin umframt sunnudagin, tá seinastu kappingarnar eru á skránni.

Í alt verður talan um 48 kappingar, og verða heiðursmerki latin trimum teimum fremstu svimjarunum í øllum kappingunum.

# Poulsen fer ongan veg

Tað hevur leingi ljóðað, at miðvallarleikarin hjá FCK, Christian Poulsen, er ávegis til enskan fótbólt, har Birmingham hevur sýnt sera stóran áhuga. Formaðurin í enska felagnum hevur sostatt áður váttað, at teir hava boðið 6 mió.£ fyri leikaran, og at felagið harumframt hevur givið honum eitt tilboð, sum hevði sett hann millum best løntu leikararnar í ensku 1. deild.

Mánadagin kunngjørdi FCK-stjórin, Flemming Østergaard, tó, at Poulsen ikki fer nakran veg í hesum umfarinum. Saman við ráðgeva sínum og ítróttarstjóranum í FCK hevur Poulsen umhugsað støðu sína, og niðurstøðan er, at hann framvegis er FCK-leikari.

- jm

# AB vil upp

**Mánakvøldið skrivaðu Argja Bóltfelag og Sámal Erik Hentze undir sáttmála, sum inniber, at Sámal Erik komandi árið skal venja mansliðið í felagnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Á Argjum hava tey seinnu árini havt eina ætlan um, at besta mansliðið í felagnum skal fara at gera seg galdandi eitt sindur ovarligari í kappingini, enn talan hevur verið um higartil.

Millum annað innibar hetta, at felagið í 1998 setti Oddbjørn Joensen sum venjara, og fyrsta árið eydnaðist alt somikið væl, at felagið vann sær rættin at spæla í triðju deild, men síðani er stígur komin í, og eftir tvey ár hevur AB framvegis ikki spælt seg upp í aðru deild.



*Sámal Erik Hentze royndi seg í fjør sum venjari hjá HB í 2. deild. Komandi árið verður tað tó hjá AB, at hann skal royna síni evni*

## Mest sum spælari

Hetta merkir tó ikki, at ætlaninar um uppflyting á nakran hátt eru sleptar. AB skrivaði mánadagin undir sáttmála við Sámal Erik Hentze um at venja felagið, og við hesum vóna tey, at hava tikið eitt stig fram ímóti uppflytanini, sum helst er neyðug, fyri at felagið kann standa seg í longdini.

Sámal Erik, sum er 29 ára gamal, hevur annars gjørt mest vart við seg sum spælari í Føroyum, og nógv roknaðu við, at talan var um ein komandi stórspælara, tá hann longu í 1989 fyri fyrstu ferð umboðaði HB í bestu deildini. Skaðar hava tó gjørt sítt til, at talið av dystum í barndómsfelagnum ikki gjørdist tað heilt stóra, og støðan var ikki stórt øðrvísi, tá hann í tvey ár royndi seg hjá B68.

Í fjør gjørdi hann so fyrstu royndina sum venjari, tá hann tók sær av næstbesta liðnum hjá HB, og leingi vóru úrslitini heilt góð her, men eftir at hava verið á odda eitt skifti, noyddist liðið at taka til takkar við einum sjeynda plássi.

## Siga ikki nei

Um nýggju avbjóðing sína sigur Sámal Erik, at hann heilt greitt hevur sum mál at tryggja felagnum uppflytan í bestu deildina. Hetta má eisini metast sum ein avgerandi fortreyt fyri fótbóltin á Argjum, tí vinnur liðið seg eina deild upp, er lítið at ivast í, at fleiri av næstbestu leikarunum hjá teimum báðum stóru havnarfeløgunum fáa hug at koma út á Argjar.

Enn hevur venjarin ikki gjørt av, um tað verður sum leikandi venjari, at hann fer at royna seg komandi árið.

- Tað veldst um, hvat fólk vit hava til uppgávuna. Enn er ikki greitt, hvørjum leikarum eg fari at arbeiða við komandi árið, men vónirnar eru sjálvsagt, at tað verða so nógvir sum gjørligt, og vit siga í øllum førum ikki nei-takk, um tað er onkur leikari úr øðrum feløgum, sum hevur hug at royna seg.

# Kassarnir eru tómir

**Hvørki Lyngby og Herfølge tykjast í løtuni at hava nakra framtíð í donskum elitufótbólti**

DANMARK
*Jákup Mørk*

Kreppan í donskum fótbólti tykist ongan enda at taka. Seinastu tíðina hava tað serliga verið tvey feløg, sum hava verið í eldinum í so máta, og í báðum førum er talan um feløg, har føroyskir leikarar áður hava roynt seg.




*Í Herfølge mugu tey nú ásanna, at leiðin av aldukambinum niður í –dalin kann vera sera stutt*

## Liðugt í Lyngby

Tað hevur leingi verið greitt, at fyrrverandi felagið hjá Toda Jónsson, Lyngby, hevur havt stórar trupulleikar. Nýggi eigarin av felagnum, Jørn Terkelsen, sum fyrr í ár keypti partabrøvini í felagnum, hevur roynt ymsar loysnir til tess at bjarga felagnum, men nú sigur Terkelsen, at framyvir verður einki, sum eitur superligafótbóltur, í Lyngby.

Hesa greiðu støðu hevur hann tikið, nú kommunan ikki vildi geva tilsøgn til ætlanina, sum Terkelsen segði vera hina seinasta í royndunum at bjarga Lyngby. Ætlanin var, at felagið saman við privatum íleggjarum skuldi fara undir at byggja og selja eldraíbúðir, og segði formaðurin tá, at íleggjararnir høvdu játtað at geva felagnum eina innspræning upp á 30 mió.kr., um ætlanin gjørdist veruleiki.

Ætlanin verður tó av ongum, nú kommunan hevur sagt nei, og nú tímir formaðurin ikki meira. Áður hevur hann roynt at fáa eina samanleggin í lag við Farum, men hendan ætlanin varð steðgað av viðhaldsfólkunum hjá Lyngby. Pengar eru eingir av í felagnum, og seinastu lønarútgjalding stóð formaðurin sjálvur fyri, men nú er hesin kassin eisini stongdur, so væntandi fara leikararnir at krevja felagið á húsagang, um teir ikki fáa útgoldið mánaðarlønina til tíðina.

Verður felagið koyrt á húsagang, hevur tað sambært reglunum hjá DBU ikki loyvi at spæla í hægri donsku deildunum, og verður tað tískil tvungið niður í Danmarks-seriuna at spæla.

## Herfølge

Í gamla felagnum hjá Jákupi Mikkelsen er støðan nærum eins ring, sum hon er í Lyngby.

Meistaraliðið frá 2000, Herfølge, hevur snøgt sagt ongar pengar í kassanum, og leikararnir hava enn lønarútgjaldinga fyri september mánað til góðar.

Hesir hava nú givið felagnum freist til 22. oktober at fáa pengar til vega, og er eingin loysn funnin til ta tíð, noyðist felagið at snara lykilinum.

Boðini úr Herfølge eru tó ikki heilt so dapurtskygd, sum tey eru úr Lyngby.

Í einum tíðindaskrivi sigur formaðurin í fakfelagnum hjá fótbóltsspælarum, Mads Øland, at leikararnir í felagnum eru sinnaðir at hjálpa til við at finna eina loysn.

Úr felagnum verður sagt, at teir í løtuni kanna, um onkur av leikarunum kann seljast, og í ringasta føri kann talan gerast um at geva leikarunum frítt at fara, soleiðis at felagið um ikki annað kann minka um lønarútreiðslurnar.

Í øllum førum er heilt víst, at í framtíðini verður ikki talan um fulltíðar yrkisfótbólt í felagnum framyvir.



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2492, P/F Bergfrost, 530 Fuglafjørður.

Viðtøkur broyttar:
14.06.2001.
Kapitalur:
Hækking við kr. 900.000,00 til kr. 2.400.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 900.000,00 til kurs 100.
Nevnd:
Farin frá sum formaður:
Óli Samró, Marinargøta 9, 188 Hoyvík.
Innkomin sum formaður:
Kristin Rasmussen, Berjabrekka 197, 100 Tórshavn.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri:
Jógvan Suni Simonsen, Innandalsvegur 11, 530 Fuglafjørður.
Innkomin sum stjóri:
Janus Rasmussen, 512 Norðagøta.

Skráseting Føroya tann 8. oktober 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1738, Sp/f Klivin, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin úr nevndini:
Elisabeth Christiansen, 480 Skáli.
Innkomin í nevndina: Atli Klein Olsen, Undir Kletti, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 8.oktober 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3, P/F Skipafelagið Føroyar, 100 Tórshavn.

Stjórn:
Farin frá sum stjóri:
Hinderikus Lamain, Irisvej 12, DK-2970 Hørsholm.

Skráseting Føroya tann 8. oktober 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1595, Sp/f Mouritsens Bussar, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar:
22.08.2001.
Nýtt navn: P/F Mouritsens Bussar
Kapitalur:
Hækking við kr. 420.000,00 til kr. 500.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 420.000,00 við grunshækking.
Grannskoðari:
Farin frá sum grannskoðari: Sp/f HanSam, Tróndargøta 39, 100 Tórshavn.
Innkomin sum grannskoðari:
Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur:
Felagið verður teknað av stjóra, einum nevndarlimi ella av allari nevndini í felag.
Endamál: Endamál felagsins er at reka ferðavinnu og handil, herundir flutning av ferðafólki, reka ferðaskrivstovu og annað arbeiði í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 8. oktober 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2906, Sp/f York Køliteknik Føroyar, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Lars Conradsen Kongstad, Strandskadevej 1c, 8250 Egå.
Innkomin í nevndina:
Allan Thorhauge, Ahornvej 34, DK-8543 Hornslet.

Skráseting Føroya tann 8. oktober 2001

Kristin Balle

---

veitst tú ikki tað?

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 427, P/F Foss, 440 Haldarsvík.

Viðtøkur broyttar:
30.08.2001.
Kapitalur:
Hækking við kr. 100.000,00 til kr. 600.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 100.000,00 við grunshækking.

Skráseting Føroya tann 8. oktober 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2626, Sp/f Metal, 640 Rituvík.

Stjórn:
Farin frá sum stjóri:
Martin Jacob Olsen, 640 Rituvík.
Innkomin sum stjóri:
Fritleif Olsen, 640 Rituvík.

Skráseting Føroya tann 8. oktober 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3060, Sp/f Arabo Consultants, 415 Oyrareingir.

Viðtøkur broyttar:
22.08.2001.
Nevnd:
Innkomin í nevndina: Rói Arabo, 415 Oyrareingir.
Endamál: Endamál felagsins er at veita ráðgeving, keyp og sølu, keyp, rakstur og útleigan av fastari ogn, eiga partabrøv í feløgum, umframt annað virksemi knýtt av hesum virksemum.

Skráseting Føroya tann 8. oktober 2001

Kristin Balle

---





## Gøtu Kvøldskúli

**veturin 2001/2002**

**Boðað verður frá luttøku á hesum støðum:**

| Lærugrein og dagur | Lærari | Tlf. |
|---|---|---|
| **Ættargransking** mikudag | Hansina Olsen | 441056 |
| **Teldulæra** týsdag | Reinhold Isaksen | 441753 |
| **Gittarspæl á byrjunarstøði** hósdag | Tórhallur Justinussen | 443114 (eftir kl. 16.00) |
| **Klaverspæl** mánadag | Magnus Jacobsen | 444457 |
| **Lær at svimja** mánadag | Oluffa á Høvdanum | 442122 |
| **Lær at telva** mánadag | Reinhold Isaksen | 441753 |

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og myndugleikanna góðkenning. Byrjað verður eftir avtalu við læraran.

**Gøtu Kvøldskúli**

Sosialurin
www.sosialurin.fo